## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin;**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um, kvøldið upp í hvassan vind. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Stígið á gólv so lættliga

**Nógv fólk hevði leitað sær í Norðurlandahúsið fríggjakvøldið fyri ólavsøku, tá nýggja bókin við kvæðaløgum varð løgd fram. Og sum vera man, varð eisini fari upp á gólv**



BÓKAÚTGÁVA
*Edvard Joensen*

**Tórshavn:** Hugnalig var løtan í Norðurlandahúsinum, tá bókin við kvæðaløgum, Føroya Kvæði, sum er áttanda bind í hesi røðini, ið Marianna Clausen hevur savnað, og forlagið Stiðin hevur givið út, varð løgd fram frígjakvøldið.

Zacharias Wang, útgevari, Høgni Hoydal, landsstýrismaður við mentamálum, og Marianna Clausen, høvundur, høvdu orðið og greiddu hvør í sínum lagi frá bókini og tí týdningi, tey væntaðu hana at fara at fáa.

Spurdur um tað ikki kann henda, at ein bók við niðurskrivaðum nótum fer at gera, at tað individuella fer at hvørva úr kvøðingini, og kvæðini verða harmoniser að, einstáttað og keðilig, svaraði Zacharias Wang, at hann væntaði ikki tað, hóast møguleikin ikki er órealistiskur at hugsa sær.

Tvørtur í móti væntaði útgevarin, at hetta kann gera, at eitt nú sumbingar fara at leggja seg eftir teimum løgum, sum upptikin og -skrivað eru í Sumba, fugloyingar eftir sínum og so framvegis, helt hann.

Saman við røðunum var eisini felagssangur og dansur á skránni. Sumbingar skipaðu brot úr Orminum Langa og Sigmundsvísu. Sum vera man nýttu teir egnar variantar av løgunum.

Eftir almenna hátíðarhaldið fingu fólk høvi at keypa bókina, sum Marianna Clausen, høvundur, signeraði.

Bókin, sum er 735 blaðsíður til støddar, er prentað í Íslandi og fer í handlinum at kosta eina krónu fyri síðuna, sum Zacharias Wang tók til, ella 735,- kr.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 13 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 20 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 29 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 34 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 988 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósmorgunin.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing eystan og gevur lágætt við ælaveðri komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/07 kl. 06[00]– 24/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 23/07 kl. 06[00]–24/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 65,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring
5. aug.: Fyrra kvarter
6. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. juli | 09.14 | 21.36 | 08.14 | 20.36 | 08.29 | 20.51 | 11.14 | 23.36 | — | 12.14 | 07.29 | 19.51 | 06.29 | 18.51 | 09.29 | 21.51 | 10.29 | 22.51 | 08.59 | 21.21 | 10.14 | 22.36 |
| 1. aug | 09.57 | 22.19 | 08.57 | 21.19 | 09.12 | 21.34 | 11.57 | — | 00.36 | 12.57 | 08.12 | 20.34 | 07.12 | 19.34 | 10.12 | 22.34 | 11.12 | 23.34 | 09.42 | 22.04 | 10.57 | 23.19 |
| 2. aug | 10.40 | 23.02 | 09.40 | 22.02 | 09.55 | 22.17 | 00.19 | 12.40 | 01.19 | 13.40 | 08.55 | 21.17 | 07.55 | 20.17 | 10.55 | 23.17 | 11.55 | — | 10.25 | 22.47 | 11.40 | — |
| 3. aug | 11.23 | 23.44 | 10.23 | 22.44 | 10.38 | 22.59 | 01.02 | 13.23 | 02.02 | 14.23 | 09.38 | 21.59 | 08.38 | 20.59 | 11.38 | 23.59 | 00.17 | 12.38 | 11.08 | 23.29 | 00.02 | 12.23 |

fk

…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT Spf.
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

5 707265 100043 >